# – Eg eri vónbrotin av Árna Joensen

**– Proforma-sølur hoyra ongastaðni heima, og vit ynskja tær, har piparið grør. Men Árni veit fullvæl, at tað eru ikki vit, sum hava sett politisku karmarnar fyri uppboðssølu í Føroyum. Vit hava tískil heldur ikki ábyrgdina av, at skipanin er, soleiðis sum hon er. Hana hava politikararnir, sigur stjórin á Fiskamarknaði Føroya, John Nielsen**



*– Nøkur viðurskifti í samrøðuni, sum Sosialurin hevur við Árna, eru beinleiðis villleiðandi, og eg haldi, at Árni átti at havt størri virðing fyri sær sjálvum, enn samrøðan ber boð um, sigur John Nielsen, stjóri í Fiskamarknaði Føroya*

UPPBOÐSSØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stjórin á Fiskamarknaði Føroya, John Nielsen, er ógvuliga vónbrotin av úttalilsunum hjá formanninum í Ráfiskaseljarafelagnum, Árna Joensen, í Sosialinum leygardagin.

– Eg eri samdur við honum í nógvum av tí, hann sigur, men eg haldi, hann í nógvum førum skjýtir niðanfyri beltið, og tað sømir seg eftir mínum tykki ikki fyri ein mann sum Árna.

John heldur, at Árni sparkar eftir einum deyðum hesti, sum hann tekur til.

– Eg eri ógvuliga vónbrotin av úttalilsunum hjá formanninum í Ráfiskaseljarafelagnum.

### Har piparið grør

Stjórin á Fiskamarknaði Føroya sigur, at er tað nakað, sum marknaðurin ynskir, har piparið grør, so er tað proforma-sølurnar, sum Árni tosar um.

– Proforma-sølur hoyra ongastaðni heima, men Árni veit fullvæl, at tað eru ikki vit, sum hava sett politisku karmarnar fyri uppboðssølu í Føroyum. Vit hava ikki ábyrgdina av, at skipanin er, soleiðis sum hon er. Hana hava politikararnir. Tað eru teir, sum hava ásett, at allur fiskur, sum fer heilur av landinum, skal bjóðast út og seljast í Føroyum. Tað er hetta, sum skapar trupulleikarnar, tá ið ov fáir keyparar eru til fiskin í Føroyum.

John sigur, at tað, sum Árni tosar um í nevndu grein í Sosialinum, hevur Fiskamarknaður Føroya arbeitt við í fleiri ár.

– Vit hava roynt at sleppa at selja heilan fisk av landinum fyri at umgangast hesar proforma-sølurnar, men higartil hevur ikki politiskur vilji verið til tað.

Stjórin heldur tað vera ógvuliga hugstoytt, at Fiskamarknaður Føroya skal ábyrgdast fyri alt, sum gongur galið í fiskivinnuni í dag.

– Vit eru bundnir á hendur og føtur av hesum lógarkarmum, sum Ráfiskaseljarafelagið og Ráfiskakeyparafelagið nú eftir øllum at døma vilja hava politikararnar at broyta.

John vísir á, at fiskamarknaðurin, sum Árni tosar um, ikki skal hava hesar trongu karmar sum haft um beinini.

– Og tá tosa vit um heilt aðrar umstøður og heilt aðrar møguleikar enn teir, ið Fiskamarknaðurin hevur og hevur havt at arbeiða undir hesi árini.

### Konseptið er ok

Hann heldur, at ein ávís frustratión er í vinnuni í løtuni, og henda frustratiónin gongur í stóran mun útyvir Fiskamarknaðin, sum undir verandi skipan ikki fær gjørt nakað við trupulleikarnar.

– Nøkur viðurskifti í samrøðuni, sum Sosialurin hevur við Árna, eru beinleiðis villleiðandi, og eg haldi, at Árni átti at havt størri virðing fyri sær sjálvum, enn samrøðan ber boð um, sigur John. Stjórin í Fiskamarknaði Føroya vísir á, at sjálv søluskipanin hjá felagnum á Toftum er so framkomin, at sjálvt uppboðssølur í Evropu hyggja hendanvegin og eru hugtiknir av henni.

– Eg dugi ikki at síggja, at nakað av tí, sum Árni tosar um, er so kollvektandi í mun til teir møguleikar, okkara skipan hevur.

Hann sigur, at Fiskamarknaðurin hevur ment sína søluskipan í samstarvi við viðskiftafólkini hjá FMF, formula. fo og Føroya Tele.

– Føroya Tele eigur konseptið við sølupartinum saman við formula.fo.

John leggur dent á, at hetta er ein rættiliga áhugaverd skipan, sum serliga er ment til okkara tørv.

– Søluskipanin er lagað eftir uppboðssøluni og ikki øvut. Aðrastaðni hava teir í størri mun lagað uppboðssøluna eftir teldu-skipanini, og tá hevur úrslitið ikki verið so gott. Tí hava aðrar uppboðssølur í Evropu stóran áhuga fyri okkara »konsepti«, sum stjórin tekur til.

### Umboð í nevnd

Stjórin í Fiskamarknaðinum sigur, at seinast í nítiárunum bjóðaði felagið ráfiskaseljarum og ráfiskakeyparum at verða við í felagnum við einum ávísum parti, soleiðis at feløgini kundu fáa ávirkan á viðurskiftini. Men feløgini avvístu hesum tilboði.

– Tey tóku kortini av at hava umboð í nevndini, og tað hava ráfiskaseljarar og ráfiskakeyparar hava síðan.

John sigur, at seinnu mettu feløgini, at tey kanska áttu at verið partur av Fiskamarknaðin kortini, og í 2000 ella 2001 varð eitt uppskot gjørt um, hvussu hetta kundi gerast.

– Men tá ið samanumkom, var ein lítil minniluti í nevndini ímóti, at Ráfiskaseljarafelagið og Ráfiskakeyparafelagið skuldu eiga ein part av Fiskamarknaðinum. Kortini hava feløgini havt umboð í nevndini hesi árini, og tað hava feløgini framvegis.

### Tvey feløg

Stjórin vísir á, at á komandi aðalfundi hjá Fiskamarknaði Føroya, sum verður komandi týsdag, skjýtir nevndin upp at umskipa felagið, soleiðis at talan verður um tvey feløg í staðin fyri eitt felag. Ætlanin við hesum er, at landingarparturin verður fyri seg og søluparturin fyri seg.

Hann vísir á, at sambært uppskotinum verður eitt dóttirfelag stovnað, sum fer at taka sær av uppboðssøluvirkseminum, meðan verandi felag heldur fram við landingarvirkseminum.

– Verður hetta uppskotið samtykt, vænti eg, at Fiskamarknaður Føroya verður umskipaður beinanvegin, sigur John.

At enda ynskir stjórin at gera eina viðmerking aftrat til formannin í Ráfiskaseljarafelagnum, Árna Joensen, sum í nevndu samrøðu helt, at prísurin fyri at selja fisk á uppsølu er ov høgur.

– Hetta er ikki rætt. Seljarar og keyparar rinda hvør síni 0,75% í uppboðssølugjaldi, og tað er ikki nógv í mun til, hvat uppboðssølur í øðrum londum taka fyri at selja fisk. At seljarar og keyparar vilja hava fiskin skildan, hevur einki við sjálvt uppboðssølugjaldið at gera, sigur stjórin í Fiskamarknaði Føroya, John Nielsen, at enda.



*Í grein í Sosialinum leygardagin fanst formaðurin í Ráfiskaseljarafelagnum, Árni Joensen, harðliga at Fiskamarknaði Føroya*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ítróttur

Nr. 102 • mikudagur • 2. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# B68 venjarin hevur sagt upp

**Aksel Højgaard hevur tikið á seg at standa fyri venjingini, eftir at Petur Mohr eftir stórtapið ímóti HB gjørdi av at gevast sum venjari á Toftum**

B68 VENJARIN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyrsta felagið hevur skift venjara í hesum kappingarárinum. Tað er B68, sum hevur fingið nýggjan venjara. 2. hvítusunnukvøld var tað Aksel Højgaard, sum stóð fyri venjingini. Tað skuldi hann eisini gera í gjárkvøldið og tað, sum er eftir av hesi vikuni. Enn er ikki endaliga greitt, um tað verður Aksel Højgaard, sum skal hava ábyrgdina, ella um B68 fer at finna sær annan venjara.

Petur Mohr gav longu í síðstu viku til kennar, at hann ætlaði at leggja frá sær. Eftir ferðina í Gundadali leygardagin tók hann so avgerðina. Eftir fimm tey fyrstu umførini er úrtøkan hjá B68 einki stig og málmunurin 3-17.

Niclas Davidsen, formaður í B68 staðfestir, at Petur Mohr hevur sagt upp, og at Aksel Højgaard hevur tikið á seg at vera venjari. Um talan er um fyribils loysn, ella um hetta verður loysnin fyri restina av kappingarárinum, dugir Niclas Davidsen ikki at siga.

– Vit hava verið nøgdir við arbeiðið, sum Petur Mohr hevur gjørt. Samstundis ásanna vit, at umstøðurnar hava ikki verið tær bestu. Í fjør vunnu vit bronsu. Nú eru vit niðast. Tað kemst fyrst og fremst av, at vit hava mist nógv fólk. Vit hava mist manning til næstan eitt heilt lið. Vit mugu bara staðfesta, at tað higartil ikki hevur eydnast at samanspælt nýggja liðið. Men tað verður arbeitt við tí, og vit vóna, at spælararnir fara at gera sítt ítarsta. Uttan mun til hvør er venjari, so er tað inni á vøllinum, at avrikini skulu fremjast, staðfesir B68 formaðurin.

Aksel Højgaard er rættuliga væl kendur í B68. Hann var millum stuðulsspælararnar og liðformaður á liðnum, sum miðskeiðis í áttati árunum vann FM tvær ferðir. Síðsta ferðin, at hann var á besta liðnum, var í 2001. Higartil í ár hevur Aksel Højgaard havt ábyrgdina av B68 unglingunum. Í fjør hevði hann ábyrgdina av 2. deildarliðnum hjá felagnum.

### Hyggja seg um

Eina ferð seinni í summar skal B68 luttaka í UEFA Cup kappingini. Tað sær ikki serliga ljóst út fyri altjóða luttøkuni. Við hesum í huga og ikki minst royndini at yvirliva í bestu deildini er tað upplagt, at B68 fer at styrkja um liðið.

*Hvussu er tað við tí?*

– Vit hyggja okkum alla tíðina um. Men tað er ikki bara sum at fara til handils. Nú tað er so langt útliðið er tað ivaleyst úr útlandinum, at møguligur styrkur skal fáast. Føroysku spælararnir eru allir upptiknir. Tað er alla tíðina ein spurningur um pengar og ein spurningur, um spælararnir, sum møguliga kunnu koma henda vegin, eru betri enn okkara egnu og harvið kunnu vera við til at lyfta liðnum. Eg havi einki nýtt at siga um nýggjar spælarar uttan tað, at vit hava gjørt avtalu við John Hera Dam, sum hevur spælt hjá okkum seinastu árini, og sum kemur aftur úr Danmark 10. juni, at hann skal venja við okkum, sigur Niclas Davidsen.

B68 hevði leygardagin ein nýggjan mann á liðnum. Talan var um bulgarska álopspælaran Stanislav Stankov. Hvør dugur er í honum sást ikki henda dagin, tí B68 hevði einki álopsspæl.

### Hevur gingið væl

Petur Mohr og B68 hava samstarvað í trý ár undan hesum kappingarárinum. Úrslitini hava verið tey somu hvørja ferð. Miðskeiðis í níti árunum vunnu B68 og Petur Mohr tvær ferðir bronsukrónur, umframt at teir eina ferð - einastu ferðina yvirhøvur at B68 hevur verið har - spældu seg í steypafinaluna, har teir taptu ímóti HB. Í fjør var úrtøkan bronsumerkini, eftir at B68 leingi hevði verið við í kappingini um FM heitið.

Meinhardt Dalbúð hevur seinastu tíðina verið hjálparvenjari hjá Peturi Mohr. Tá ið venjarin legði frá sær, fylgdi hjálparvenjarin honum.

Sum nevnt omanfyri so er B68 fyrsta felagið, sum í hesum kappingarárinum skiftir venjara. Í fjør skifti einki felag í 1. deild venjara, meðan tað varð kappast. Tað var rættuliga sjáldsamt sammett við í fyrraárið, tá ið fleiri venjarar fóru úr starvinum.

Fyrsta uppgávan hjá B68, eftir at Petur Mohr er farin úr venjarasessinum, verður nú sunnudagin á heimavølli ímóti VB. Næstu vikuskiftini vera rættuliga avgerandi fyri lagnuna hjá B68. Annað vikuskifti skulu teir á útivølli spæla ímóti ÍF, sum í løtuni er næstniðast, og so skulu teir spæla á útivølli ímóti EBStreymi, sum undan síðsta vikuskifti var næstaftast.



*Tey trý undanfarnu árini, sum Petur Mohr hevur verið á Toftum, hava úrslitini verið góð, men í ár hevur verið púrasta eiðasørt*

## So kemur høllin

So er greitt, at B36 og HB kunnu fara undir at byggja eina fótbóltshøll millum tey bæði felagshúsini.

Longu fyri fimm árum síðani vóru ítøkiligar ætlanir um hetta, men ta ferðina gjørdist tað av ongum, tí Býráðið ikki sá seg ført fyri at veita ætlanini peningaligan stuðul.

Tann parturin er tó í lagi hesaferð. Á býráðsfundi hóskvøldið í farnu viku varð nevnliga samtykt, at Býráðið skal veita stuðul upp 30% av verkætlanini, sum samanlagt verður mett at kosta onkra staðni millum sjey og átta mió kr.

Sambært ætlanini verður høllin bygd soleiðis, at talan verður um fótbóltshøll í niðaru hæddini, meðan Havnar Fimleikarfelag skal leiga ovaru hæddina.

**-jm**

## Framvegis seks lið

Á aðalfundinum hjá Flogbóltssambandinum varð eitt broytingaruppskot lagt fram.

Hetta var frá Fleyr, sum vildi hava meistaradeildina hjá kvinnunum víðkaða úr seks upp í sjey lið.

Fleyr mátti í vetur ásanna, at tær ikki megnaðu at spæla seg framhaldandi luttøku í bestu kvinnudeildini, men hóast tey soleiðis royndu at halda fast um møguleikan, so fall uppskotið við seks atkvøðum móti fimm.

**-jm**

## NSÍ móti Esbjerg

Tað stóð longu greitt undan seinasta umfarinum í superliguni, at Esbjerg fór at enda á triðja plássinum. Við hesum fær sensatiónsliðið í superliguni í ár rættin at spæla inter-toto fótbólt í summar, og her verður mótstøðuliðið NSÍ.

Fyrri dysturin í intertoto kappingini verður tann 19. juni.

**-jm**